# Býargartnari til Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar kommuna lýsir starvið sum býargartnari í kommununi leyst til setan 01. juni 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.**
- At hava dagligu leiðsluna á gartnaradeildini, sum er ein partur av teknisku deild kommununar.
- At umsita fríøkir – nýgerð og planlegging.
- At umsita viðlíkahald av fríøkjum.
- At umsita kirkjugarðarnar í kommununi.
- At umsita spæli- og útiverupláss.
- At umsita leikvøllin og økið uttanum.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur útbúgving sum gartnari ella aðra líknandi útbúgving.
- Hevur leiðsluroyndir.
- Dugir væl at samstarva.
- Ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur telduførleika á brúkarastøði.
- Hevur koyrikort.
- Hevur áhuga fyri tekniskum viðurskiftum sum heild.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Góða løn til rætta umsøkjaran.
- Møguleika fyri skeiðum innan arbeiðsøkið.
- Eitt gott, fjølbroytt og spennandi starv við møguleikum fyri at menna seg.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðar og hevur býargartnarin beinleiðis tilvísing til teknisku deild kommununar. Annars kemur tú at hava tætt samskiftið bæði við vatn- og kloakkformannin og arbeiðsformannin.
Lønar og setanarviðurskiftini verða sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hava tygum áhuga:**
so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við møguligum prógvum og CV og viðmælum til Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða kommununi í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 07. apríl 2006 kl. 15.00.**

**Upplýsningar um starvið:**
kunnu fáast við at venda sær til Pætur Joensen, býarverkfrøðing á telefon 225.351 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211.102.

Kommuna skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Umsóknirnar skulu verða merktar: **»Starv sum býargartnari«.**

Fuglafjørður, tann 16. mars 2006

**Fuglafjarðar kommuna**


# Hygg her - hygg her!!!

**Ert tú áhugaður at hava títt egna virki?**
**Ert tú áhugaður at vera føroya besti innan álegging, slíping, polering o.a. av gólvum?**
**Okkum tørvar fólk at taka sær av okkara kundum**
**Vit hava tólini og alla vitanina. Okkum manglar bara teg.**

**Vekjir hetta tín áhuga? - ...so ring til 31 88 75 / 21 88 75 og frætt nærri**


# Arbeiðsformaður til Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 23. februar 2006 samtykt, at starvið sum arbeiðsformaður verður lutað sundur soleiðis, at talan framyvir verður um 2 størv á vega- vatn- og kloakkdeildini í staðin fyri eitt.
Størvini, talan er um, er eitt starv sum arbeiðsformaður og eitt sum vatn- og kloakkformaður.

Í hesum sambandi loyvir Fuglafjarðar kommuna sær at søkja eftir arbeiðsformanni at byrja 01. juni 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.**
- At hava dagligu leiðsluna á vegdeildini, sum er ein partur av teknisku deild kommununar.
- At umsita ávís økir og ognir hjá kommununi.
- Viðlíkahald og møguligar nýgerðir av vegum og gøtum, herundir útstykkingar.
- Viðlíkahaldi av áum.
- Rakstur av gøtuljósum, uppseting og nýmonteran.
- Skipan av kavagrevstri.
- Ábyrgd av umsiting og eftirliti av renovatiónini herundir ruskøkjunum.
- Ábyrgd av vetrarfriðingini.
- Ábyrgd av rottuoyðingini.
- Ábyrgd av viðlíkahaldi og skrásetingum av amboðum.
- Ábyrgd av viðlíkahald av akførum, gravimaskinum og øðrum arbeiðstólum hjá teknisku deildini.
- Ábyrgd av vega- og gøtunavnaskeltum.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur útbúgving sum handverkari og/ella tekniska útbúgving.
- Hevur leiðsluroyndir.
- Dugir væl at samstarva.
- Ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur telduførleika á brúkarastøði.
- Hevur koyrikort.
- Hevur áhuga fyri tekniskum viðurskiftum sum heild.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Góða løn til rætta umsøkjaran.
- Møguleika fyri skeiðum innan arbeiðsøkið.
- Eitt gott, fjølbroytt og spennandi starv við møguleikum fyri at menna seg.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðar og hevur arbeiðsformaðurin beinleiðis tilvísing til teknisku deild kommununar. Annars kemur tú at hava tætt samskiftið bæði við vatn- og kloakkformannin og býargartnaran.
Lønar og setanarviðurskiftini verða sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hava tygum áhuga:**
so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við møguligum prógvum og CV og viðmælum til Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða kommununi í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 7. apríl 2006 kl. 15.00.**

**Upplýsningar um starvið:**
kunnu fáast við at venda sær til Pætur Joensen, býarverkfrøðing á telefon 225.351 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211.102.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Umsóknirnar skulu verða merktar: **»Starv sum arbeiðsformaður«.**

Fuglafjørður, tann 16. mars 2006

**Fuglafjarðar kommuna**